# Menningarstovan yvirtekur TK-Stovuna og víðkar tænastuna




**Menningarstovan adopterar virksemið hjá niðurløgdu TK Stovuni og skal nú umframt export marknaðarførslu eisini leggja dent á tøknifrøði og leiðslu**

VINNUMENNING
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Á Menningarstovuni er aftur aktuelt við nýskipan, aftan á at TIC, tað danska vinnuframa netverkið undir Erhvervsministeriet sum eisini umfataði TK Stovuna, varð lagt niður um árskiftið. Menningarstovan og TK Stovan byrjaðu longu í heyst at samantvinna virksemið hjá báðum stovunum innan uppskotið til fíggjarlóg tá; í vón um grønt ljós á komandi fíggjarlóg hjá Løgtinginum, eru trý av teimum fýra fólkunum, ið arbeiddu har sett í fyribils starv, teirra millum fyrrverandi stjórin Jákup Mørkøre.

Síðani árslok hevur konseptið hjá TK Stovuni hingið í leysum lofti og okkurt bendir á at stórur saknur hevði verið í ráðgevingini og hjálpini sum bæði startups og etableraðar fyritøkur hava notið gott av.

TK Stovan, sum helvt um helvt varð fíggjað av Erhvervsministeriet og tí føroyska Vinnumálaráðnum, hevði alla tíðina eitt ávíst samstarv við Menningarstovuna, sum eisini yvirtók Áka Johansen til at leiða ta nýggju Útflutningsdeildina fyri tveimum árum síðani. Áki Johansen var eisini við til at leggja lunnar undir TK Stovuna um millenniiskiftið.

Ein yvirtøka av funktiónum hjá TK Stovuni skal sum skilst kortini ikki broyta fokus í útflutnings tænastuvirkseminum hjá Menningarstovuni, men skal hinvegin geva møguleika fyri at víðka um tænastuvirksemið til eisini at fevna um leiðslu og tøknifrøði í víðari merking.

## 'Sustainability'

Tað kann vera torført at ímynda sær at stjórin á Menningarstovuni, Kjartan Kristiansen, er fegin um at enn einaferð skula umleggja stovnin; tónin er tó alt annað enn trútin tá vit tosa við hann.

– Vit mugu ásanna, at vinnan vísti stóran áhuga fyri tænastunum hjá TK Stovuni, segði Kjartan Kristiansen.

– Samanlegging av stovunum gevur møguleikar at víðka um og dagføra raðfestingina í virkseminum hjá Menningarstovuni, legði hann afturat.

– Starvsfólkini á TK Stovuni vóru uppsøgd og vit hava sett trý teirra í starv her, fyribils til vit hava fíggjárlóg; tey eru Jákup Mørkøre, Steinbjørn í Dali og Aina Knudsen. Beint nú arbeiða vit so við at organisera okkum av nýggjum og tað liggur sjálvandi ein ávís avbjóðing í hesum. Tað snýr seg um at samantvinna tveir ymiskar kulturar og fáa nýggjar tænastur inn í okkara útboð.

Meðan Menningarstovan traditionelt, og enn meira tey seinastu tvey árini, hevur gjørt nógv burtur úr at veita fyritøkum hjálp í sambandi við útflutning og í at styrkja kappingarføri gjøgnum marknaðarliga orientering, so legði TK Stovan meira dent á ráðgeving og tænastur til íbirtarar umframt verandi fyritøkur á heima marknaðinum.

– Vit hava tey seinastu tvey árini hugsað mest um útflutning og um at menna kappingarførið í hesum sambandi og hetta er eisini sera týdningarmikið, helt Kjartan Kristiansen fram.

– Hin parturin er tó líka umráðandi: leiðsla og tøknilig menning innan fyritøkurnar; herundir tey alsamt vaksandi krøvini hvat umhvørvi viðvíkur, altso at vit fáa sjálvberandi fyritøkur… fíggjarligt, umhvørvisligt og sosialt. Vit mugu hava vørur og tænastur sum umhvørvisliga eru burðardyggar, men fyritøkurnar mugu eisini vera búskaparliga og umhvørvisliga lívførar. At menna hetta er eisini partur av tí orðaða vinnupolitikkinum.

Menningarstovan hevur annars í longri tíð arbeitt nógv við innaneftirliti og góðskustýring í samstarvi við millum annað Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Kjartan Kristiansen fegnast um at arbeiðið sæst aftur.

– Nú er so høvi til at arbeiða víðari við teimum krøvum sum verða sett føroyskum fyritøkum í altjóða kapping, og 'sustainability' er eitt lyklaorð. Men tað er gleðiligt at nógvar fyritøkur tey seinnu árini hava fingið certifiering og eru farnar at taka dygdarkrøv og atlit til umhvørvi í størri álvara.

## Átta fólk

Menningarstovan, sum í altjóða høpi kallar seg Faroe Islands Trade Council, er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum. Ráðið fyri Menningarstovuna er sett saman av sjey limum av hvørjum fimm umboða vinnuna, ein útbúgvingarverkið og ein Vinnumálaráðið. Ráðið fyri Menningarstovuna verður valt av Landsstýrinum fyri fýra ár í senn og skal ráðgeva Landsstýrinum og Menningarstovuni.

Í lógini og reglugerðini fyri Menningarstovuna frá 2000, verður ásett at Menningarstovan skal »menna ídnað, handverk og tænastuvirksemi og í sambandi við hetta veita ráðgeving og upplýsing innan tøkni, búskap, leiðslu og útflutning.«

Virksemið skal soleiðis byggja brýr millum tann politiska viljan og vinnuna um vinnumenning, og skal málrættast eftir at menna útflutningsførleikan hjá føroyskum fyritøkum, menna útvaldar og nýggjar vinnugreinar, seta fokus á útvald øki fyri menning og menna tann vinnuliga infrastrukturin.

Stjórin á Menningarstovuni, settur av Landsstýrinum eftir tilmæli frá Ráðnum, hevur ta dagligu leiðsluna á Menningarstovuni um hendi og er samstundis fastur skrivari hjá Ráðnum.

Á Menningarstovuni arbeiða í løtuni átta fólk haraf trý fyribils frá niðurløgdu TK Stovuni og tvey fólk á Útflutningsdeildini sum varð skipað í fjør.

Menningastovan hýsir eisini KT Klekingardeplinum, Granskingarráðnum og NORA (Norrønt Atlantssamstarv).

# ítróttur

Nr. 21 • leygardagur • 31. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Grannarnir hittast

**Allir dystirnir í mansdeildini um vikuskiftið eru av slagnum, har grannar á stigatalvuni hittast, og í Havn er talan samstundis um bæði lokal- og toppuppgerð**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Talan verður um tað heilt stóra brakið, tá grannarnir í høvuðsstaðnum hittast sunnudagin, og vil væl til hjá Kyndli, so kann eitt avgerandi fet móti FM-heitinum takast her*

Alt bendir á eitt framúr spennandi hondbóltsvikuskifti, nú upphitingin til steypafinalurnar skal standa sína roynd. Tríggir dystir eru sum vant á skránni, og skal takast eftir stigatalvuni, so er einki at ivast í, at talan verður um spennandi uppgerðir. Í øllum trimum førunum er tað nevnliga so, at liðini, ið hittast, liggja lið um lið á talvuni.

## Kunnu rykkja

Í so máta er spenningurin helst størstur um dystin í Havn, har oddaliðini bæði hittast. At hesi so eisini eru grannarnir báðir, Kyndil og Neistin, ger ikki spenningin minni.

Og oman á tað heila, so líkist hetta í løtuni einum dysti, sum veruliga kann siga øllum, at Kyndil nú aftur er til reiðar at taka føroysku hondbóltstrúnuna. Sum støðan er á talvuni í løtuni, so eru Kyndilsmenn trý stig undan Neistanum, og tí kann Kyndil við einum sigri her skap eitt hol, sum fer at verða næstan ógjørligt hjá mótstøðuliðunum at tippa aftur. Júst hetta seinasta munnu tey í Kyndli tó helst vera tey seinastu at staðfesta, tí tey munnu enn ikki hava gloymt várið í '99, tá Kyndil undan teimum trimum seinastu umførunum at kalla hevði vunnið meistaraheitið, fyri síðani at tapa tríggjar dystir á rað.

Hjá Neistanum man ein av stóru spurningunum vera, hvussu væl liðið hevur megnað at fingið Heina Joensen spældan inn. Seinasta vikuskiftið sýndi hann, at hann væl kann gerast tann stóri fongurin, sum vónirnar vóru til, og í øllum førum gevur tað álopsspælinum hjá liðnum eina heilt nýggja dimensión. Hartil er spurningurin tó eisini, hvørt Áki Mørk nú er tøkur aftur, eftir at hann hevur verið skaddur í góðan mánað. Seinast var hann partur av dómaraseðlinum, men kom tó ikki í dyst.

## Olsen-bandin á trappuni

Á Skála skulu StÍF og VÍF triðju ferðina innan tíggju dagar takast, og tað er einki at ivast í, at vestmenningar nú meta seg eiga nakað av hevnd til góðar. Heldur ikki hesa ferð gekk tað hjá VÍF at basa strandingunum í steypakappingini, og hóast útlitini ikki eru so bjørt, sum tey onkra tíð hava verið, so er landskappingin nú einasta vónin hjá VÍF.

Her er fjarstøðan upp til oddin í løtuni fimm stig, og so má VÍF annars bara vóna, at Neistin tekur slagið í Havnini, og at teir sjálvir klára at toga seg upp, og er munurin so trý stig, so er tað kanska ikki heilt óhugsandi, at teir kunnu taka seinasta fetið upp, men tað krevur so annað spæl enn tað, sum VÍF fyri tað mesta hevur sýnt í ár!

Og spurningurin er so, hvørjar leikarar VÍF fer at hava við sær hesaferð. Ingi Olsen er framvegis darvaður av skaða, men hann verður kanska pjøssaður saman í seinastu royndini at bjarga árinum. Og so er tað spurningurin, hvussu verður við Áka Olsen. Enn hevur hann ikki verið á vøllinum í ár, men mikukvøldið var hann millum menninar á beinkinum, og tó at hann neyvan enn er førur fyri at spæla 60 minuttir við fullari ferð, so man skotarmurin framvegis teljast millum teir harðastu í landinum.

Hjá StÍF ræður sjálvandi eisini um at fáa neyðugu stigini til høldar. Á talvuni eru teir eitt stig betri enn VÍF, og tí kunnu teir – um væl vil til – koma at standa tvey stig undir oddinum eftir dystirnar sunnudagin. Tað gevur í øllum førum ein stóran møguleika at fara eftir greipuni, sum liðið enn ikki hevur vunnið, men størsti spurningurin er framvegis, hvørt liðið hevur neyðugu breiddina at standa seg, nú tveir týðandi leikarar framvegis sita uttanfyri.

## Frøi á viðhaldsfólkunum

Seinasti dysturin hetta umfarið er í Hoyvík, har tey bæði botnliðini, H71 og KÍF takast. Sum so kanska ikki ein dystur, sum fær blóðið í kók hjá so nógvum áskoðarum, um stigatalvan skal vera einasta barometrið, men hesa seinastu vikuna hava viðhaldsfólkini hjá báðum pørtum tó fingið nakað at frøast um.

Einamest hoyvíkingar, sum nú fara at gera seg til fyrstu steypafinaluna hjá liðnum í seks ár, eftir at teir enn einaferð sýndu, at skal Kyndil takast, so eru teir væl næstir.

Kollfirðingarnir sýndu tó við sigrinum á StÍF farna vikuskifti, at heldur ikki teir eru fyri nothing. Ikki minst telir tað rætta vegin, at Damir Oros nú aftur er tøkur eftir drúgvan skaðasteðg, men eisini í aðrar mátar er liðið nú fullmannað, og tá kann tað væl vísa seg, at teir fara at gerast drúgvir hjá fleiri av mótstøðuliðunum.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

1. deild kvinnur

| Dagur | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 01.02 | 14.30 | Kyndil-Neistin | Trygvi Mortensen & Kári Hansen |
| 01.02 | 14.30 | StÍF-VÍF | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 01.02 | 15.00 | Stjørnan-VB | Kristian Johansen & Sámal Hansen |

1. deild menn

| Dagur | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 01.02 | 16.00 | Kyndil-VB | Trygvi Mortensen & Kári Hansen |
| 01.02 | 16.00 | H71-KÍF | Karsten Joensen & Kristian Joensen |
| 01.02 | 16.00 | StÍF-VÍF | Hannis Wardum & Uni Wardum |

### Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 31.01 | 14.00 | Mjølnir-Dráttur | Fleyr |
| 31.01 | 15.00 | TB-ÍF | KÍF |
| 01.02 | 14.00 | Dráttur-TB | KÍF |

Meistaradeild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 31.01 | 16.00 | Fram-Fleyr | ÍF |
| 31.01 | 16.00 | Mjølnir-SÍ | ÍF |